**P/F reg. nr. 6115**

# P/F NORDIKLÍV LÍVSTRYGGINGARFELAG

## ÁRSFRÁSØGN

### FYRI

## 2018

Ársfrásøgnin fyri 2018 er góðkend á aðalfundi felagsins hin 4. apríl 2019.
Fundarstjóri: Rune Nørregaard

**Innihaldsyvirlit**


| | síða |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| 5 ára yvirlit | 3 |
| Leiðslufrágreiðing | 3 |
| Leiðsluátekning | 8 |
| Átekning frá innanhýsis grannskoðan | 9 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 10 |
| Nýttur roknskaparháttur | 13 |
| Rakstrarúrslit | 16 |
| Fíggjarstøða pr. 31. december | 17 |
| Eginognsuppgerð | 19 |
| Notur | 20 |

**Upplýsingar um felagið**

**Felagið**

| | |
|---|---|
| Navn: | P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag |
| Heimstaður: | Oknarvegur 5, Postboks 3048, 110 Tórshavn |
| Skrásetingarnummar: | 6115 |
| Roknskaparár | 4 |

**Nevnd**
Turið F. Arge, forkvinna
Christian Clemmensen
Árni Ellefsen
Rune Nørregaard

**Stjórn**
Brian Smedemark

**Grannskoðarar**
PricewaterhouseCoopers, Statsautoriseret Revisionspartnerselskab
JANUAR, løggilt grannskoðanarvirki P/F

Arndis Poulsen
Innanhýsis grannskoðan

Ársfrásøgnin er góðkend á felagsins aðalfundi tann 4. apríl 2019

______________________
fundarstjóri

# 5 ára yvirlit

Felagið bleiv stovnað í 2015 og tí fevnir 5 ára yvirlitið einans yvir 4 ár.

**Høvuðstøl kr. 1.000**

**Rakstur**

| | **2018** | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tryggingargjøld | 12.838 | 11.329 | 9.808 | 0 | |
| Tryggingarveitingar | 2.450 | 6.320 | 3.860 | 0 | |
| Úrslit av íløguvirksemi | -251 | -184 | -77 | 0 | |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | 4.213 | 4.133 | 5.293 | 297 | |
| Úrslit av endurtrygging | -418 | -399 | -388 | 0 | |
| Tryggingartekniskt úrslit | 6.174 | 876 | 656 | -297 | |
| Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutrygging | 905 | 525 | 105 | 0 | |
| Úrslit | 5.599 | 998 | 561 | -243 | |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur í alt | 2.004 | 2.093 | 1.060 | 0 | |
| Eginogn í alt | 36.914 | 31.315 | 30.318 | 29.757 | |
| Ogn í alt | 42.522 | 36.757 | 36.000 | 29.757 | |

**Lyklatøl**

| | 2018 | 2017 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Kostnaðarprosent av tryggingargjøldum / eftirlønargjøldum | 32,8% | 36,5% | 51,9% |
| Kostnaðarprosent av avsetingum | 205,7% | 262,2% | 499,3% |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan / lim - við niðurskalering upp á 0,1 av samlagstryggingum | 6.733 | 6.735 | 8.613 |
| Miðalkostnaður fyri hvønn tryggjaðan | 673 | 674 | 861 |
| Eigarakapitalstig / Eginpeningsstig | 18,4 | 21,5 | 28,6 |
| Ognarkapitalstig | 86,8% | 85,2% | 84,2% |
| Yvirfulnaðarstig | 687,5% | 467,4% | 405,4% |
| Solvensdekningur | 122,7% | 127,9% | 116,5% |
| Renting av eginogn áðrenn skatt | 20,8% | 4,5% | 2,5% |
| Renting av eginogn eftir skatt | 16,4% | 3,2% | 1,8% |
| Renting av fíggjarognum | -0,7% | -0,5% | -0,2% |

**Leiðslufrágreiðing**

**Endamál**
Endamál felagsins er at reka pensjóns- og livstryggingarvirksemi á føroyska marknaðinum.

**Ársúrslitið**
Ársúrslitið fyri 2018, er nakað betri enn leiðslan metti úrslitið fór at vera, og tí er úrslitið nøktandi.

**Fíggjarstøðan**
Fíggjarstøðan var við árslok upp á 36.757 tkr. Eginpeningurin var 31.315 tkr. við árslok 2017.

**Framtíðarvánir**
Útlitini fyri 2019 eru góð. Virksemið fer væntandi at økjast og roknað verður við einum avlopi.

**Týningarmiklar hendingar eftir roknskaparárslok**
Tað hava ikki verið serligar hendingar eftir roknskaparárslok til í dag, sum hava týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

**Útveiting og vitanartilfeingi**
Allar umsitingarligar uppgávur eru útveittar við útveitingaravtalum. Felagið hevur gjøgnum útveitingaravtalurnar tryggja sær, at øll sum taka sær av uppgávum felagsins hava holla vitan innan øki.

**Styring av váða**
Váði er í øllum viðurskiftum, sum ávirka møguleikar felagsins á ein hátt, sum gera tað truplari at røkka settu málunum. Settar eru í verk yvirskipaðar leiðreglur, sum leiðslan ansar eftir vera fylgdar.

**Marknaðarváðar**

| Týdningarmestu váðarnir | Val í mun til váðar | Váðalækkandi virksemi |
|---|---|---|
| Rentuváði | Málið við íløguvirksemi felansins er at fáa sum mest avkast við einum ásettum váðastøði, sum nevndin ásetur<br><br>Miðað verður eftir eini skilagóðari spjaðing av íløgunum | Nevndin í NordikLív hevur samtykt ein íløgupolitikk, sum ásetir karmarnar fyri íløgur felagsins. Íløgupolitikkurin verður dagførdur eftir tørvi ella í minsta lagi árliga.<br><br>Spjaðingarváðin er avmarkaður við at spjaða íløgur felagsins í ymisk lánsbrøv.<br><br>Gjaldførisváðin verður avmarkaður við at hava munandi partar av íløgunum í tøkum peningi og í lánsbrøvum, sum eru skrásett í keypsskálum.<br><br>Mótpartsváðin verður m.a. avmarkaður við at hava mørk fyri, hvussu stór íløga kann gerast í einstøkum mótparti. |

**Tryggingarváðar**

| Týdningarmestu váðarnir | Val í mun til váðar | Váðalækkandi virksemi |
|---|---|---|
| Livitíð<br><br>Deyðstíttleiki<br><br>Avlamistíttleiki<br><br>Spjaðing | Lønandi virksemi á øllum tryggingar-produktum.<br><br>Váðaspjaðing millum tryggingar- og kundabólkar<br><br>Avmarkandi úrslitsávirkan frá ein-støkum skaðahendingum við endur-trygging | Felagið brúkar prísásetingaramboð, sum taka hædd fyri váðunum og marknaðar-støðuni.<br><br>Greiðar inntekningarreglur.<br><br>Váðajavning við endurtrygging og við hámørkum fyri ymsum tryggingar-dekningum.<br><br>Gott dátugrundarlag |

**Operasjonellur váði**

| Týdningarmestu váðarnir | Val í mun til váðar | Váðalækkandi virksemi |
|---|---|---|
| KT-váðar<br><br>Løgfrøðiligir váðar<br><br>Umsitingarligir váðar<br><br>Svik<br><br>Umdømi<br><br>Strategi | Ásannað verður, at ikki slepst undan rakstrarligum váðum, men hesir skulu avmarkast til støðið, sum nevndin góðtekur. | Felagið avmarkar operasjonella váðan við leiðreglum, innaneftirliti og funksjónskilnaði. Hetta verður alsamt endurskoðað og dagført.<br><br>Harumframt fylgir felagið neyvt við gongdini á marknaðinum fyri at tryggja, at prísir og tænastustøði eru kappingar-før.<br><br>Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu umframt opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við kundan. |

**Váðaframtíðarmynd**
Váðaviðurskiftini eru myndað í talvuni niðanfyri. Talvan vísir váðaviurskiftini undir teimum settu fyritreytunum fyri teir týdningarmestu váðafaktorarnar. Teir settu faktorarnir eru dømi og skulu ikki takast sum væntanirnar hjá NordikLív.

31. desember 2018

| Váðaviðurskifti við ymsum framtíðarmyndum - tølini eru eftir skatt | Váða-mynd | Samlað ávirkan á úrslitið | Broyting í eginong felagsins |
|---|---|---|---|
| Rentuberandi fíggjarkrøv | a | -207 | -0,5% |
| Rentuberandi fíggjarkrøv | a | 207 | 0,5% |
| | | | |

a) Rentuhækking upp á 0,7 prosent stig
a) Rentulækking upp á 0,7 prosent stig

**Kapitalstyrki**
Kapitalstyrkin hjá NordikLív er í mun til tryggingarskyldurnar er víst í yvirlitinum niðanfyri:

| DKK 1.000 | **2018** | **2017** |
|---|---|---|
| Eginogn | 36.914 | 31.315 |
| Grundarfæfeingi | 33.914 | 33.315 |
| Fæfeingiskrav | 27.629 | 26.057 |
| Kapitalstyrki | 6.285 | 7.258 |

Við árslok 2018 var kapitalstyrkin hjá felagnum 6,3 mió.kr. í mun til 7,3 mió.kr. við árslok 2017. Mett verður, at felagið hevur neyðuga fíggjarligu styrkina við atliti til galdandi lógarkrøv. Fæfeingiskravið er 3,7 mió evrur umroknað til 27.629 tkr.

**Individuellur solvenstørvur**
Føroysku ásetingarnar um individuellan solvenstørv eru tær somu sum tær donsku. Individuelli solvenstørvurin ger upp kapitalkravið fyri tryggarfelagið við støði í váðunum, felagið hevur. Vegleiðingin hjá Tryggingareftirlitinum ásetir ikki nakran serligan hátt til uppgerðina. Felagið skal sjálvt velja uppgerðarháttin, og skal taka støðu til allar týðandi váðar.

Sum fastur táttur í váðastýringini eyðmerkir og nøgdargreinar nevndin minst einaferð árliga allar týdningarmiklar váðar hjá felagnum. Fyri hvønn váðabólk verður ásett eitt kapitalkrav, sum verður nýtt í sambandi við uppgerð av individuella solvenstørvinum. Váðametingin er í høvuðsheitinum grundað á politikkir, sum hvørt ár verða viðgjørdir og góðkendir av nevndini. Í uppgerðini av individuella solvenstørvinum tekur NordikLív støði í Solvens II royndarútrokningini QIS5 hjá EU.

Individuelli solvenstørvurin hjá NordikLív er 11.586 tkr. við árslok 2018. Yvirdekningurin í mun til individuella solvenstørvin var 25.327 tkr.

**Eigaraviðurskifti**
P/FBankNordik er móðurfelag hjá NordikLív og eigur allan partapeningin hjá felagnum.

**Nevnd og stjórn**
Onnur leiðslustørv í føroyskum partafeløgum hjá nevnd og stjórn:

**Nevndin**

| | |
|---|---|
| Turid F. Arge | P/F Trygd, nevndarforkvinna<br>P/F Skyn, nevndarforkvinna |
| Christian Clemmensen | P/F Trygd Tryggingarfelag, nevndarlimur |
| Árni Ellefsen | Forstjóri BankNordik<br>P/F Trygd Tryggingarfelag, nevndarlimur<br>P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag, nevndarlimur<br>P/F Skyn, nevndarlimur<br>Felagið Peningastovnar, nevndarformaður<br>Arbeiðsgevarafelagið fyri fíggjarstovnar, nevndarlimur |
| Rune Nørregaard | P/F Trygd Tryggingarfelag, nevndarlimur<br>P/F Skyn, nevndarlimur |

**Stjórn**

| | |
|---|---|
| Brian Smedemark | P/F Trygd Tryggingarfelag, stjóri<br>P/F Elektron, næstformaður |

**Leiðsluátekning**

Vit leggja við hesum fram ársfrásøgn fyri P/F NordikLív Lívstryggingarfelag fyri 2018. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Tað er okkara fatan, at nýttur roknskaparháttur er hóskandi og tryggjar, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2018 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið frá stovnan 1. januar 2018 – 31. desember 2018. Samstundis er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin greiðir rættvísandi frá teimum viðurskiftum, sum frágreiðingin fevnir um.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri aðalfundin við tilmæli um góðkenning..

Tórshavn, tann 28. februar 2019

Stjórn:

______________
Brian Smedemark

Nevnd:

| ____________ | __________________ | ______________ |
|---|---|---|
| Turið F. Arge<br>forkvinna | Christian Clemmensen | Árni Ellefsen |

______________
Rune Nørregaard

**Átekning frá innanhýsis grannskoðara**

## Til partaeigararan í P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag

## Átekning á ársroknskapin

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin hjá P/F NordikLív gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2018 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2018 í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Okkara niðurstøða er í samsvari við okkara grannskoðanarprotokoll til nevnd felagsins.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Vit hava grannskoða ársroknskapin hjá P/F NordikLív fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2018 Ársroknskapurin er gjørdur í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Grannskoðanin er framd sambært føroysku kunngerðini um grannskoðan av tryggingarfeløgum og fíggjarligum samtøkum, og í samsvari við altjóða standardum um grannskoðan viðvíkjandi at leggja til rættis og grannskoða.

Vit hava lagt ætlan um og grannskoða, fyri at fáa høga vissu fyri, at ársroknskapurin ikki hevur týðandi skeivleikar. Vit hava luttikið í grannskoðanini av øllum týðandi og váðafullum økjum.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina fyri leiðslufrágreiðingini.

Niðurstøða okkara um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu fyri leiðslufrágreiðingini.

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum, er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina, og í hesum sambandi at umhugsa, um leiðslufrágreiðingin ikki er í samsvari við ársroknskapin ella er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnir eftir føroysku tryggingarlóggávuni eru umrøddir í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í okkara arbeiði er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og er gjørd eftir ásetingunum í føroysku tryggingarlóggávuni.

Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivar upplýsingar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 28. februar 2019

Arndis Poulsen
Grannskoðanarleiðari

## Átekning frá óheftum grannskoðarum

***Til kapitaleigaran í P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag***

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2018 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2018 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

**Hvat vit hava grannskoðað**
Ársrsroknskapin hjá P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2018 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginpeningsuppgerð og notum, saman við nýttum roknskaparhátti felagsins. Undir einum nevnt "Ársfrásøgnin".

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardum fyri grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin".

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Óheftni**
Vit eru óheft av felagnum í samsvari við altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum er galdandi í Føroyum, og hava fylgt etisku skyldunum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Leiðslan hevur ábyrgdina fyri leiðslufrágreiðingini.

Niðurstøða okkara um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu fyri leiðslufrágreiðingini.

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum, er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina, og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin ikki er í samsvari við ársroknskapin ella er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir føroysku tryggingarlóggávuni eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í okkara arbeiði er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd eftir ásetingunum í føroysku tryggingarlóggávuni. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivar upplýsingar í leiðslufrágreiðingini.

Leiðslan hevur ábyrgdina av kravdu kapitalupphæddini.
Tí umfatar okkara niðurstøða í átekningini til ársfrásøgnina ikki kravdu kapitalupphæddina, og vit geva onga niðurstøðu við vissu til hetta.

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársfrásøgnini er tað okkara ábyrgd at meta, um minst kravda kapitalupphæddin í øllum týðandi er í ósamsvari við ársfrásøgnina, ella tað vitan vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt sýnist at vera heft við týðandi skeivleikum.

Um vit, grundað á hetta, koma til tað niðurstøðu, at minst kravta kapitalkravið er heft við týðandi skeivleikum, skulu vit boða frá hesum. Vit hava einki at boða frá í hesum sambandi.

**Ábyrgd fyri roknskapinum og grannskoðanini**

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við føroysku tryggingarlóggávuna. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til fyri, at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, er tað ábyrgd leiðslunnar at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað hevur týdning at upplýsa um viðurskiftir viðvíkjandi framhaldandi rakstri, og at gera ársroknskapin eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, støðga rakstrinum ella, at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan, og ásetingunum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um hesir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og mugu metast at vera týðandi, um tað eru sannlíkindi fyri, at tey hvør sær ella saman ávirka tær fíggjarligu støðutakanir, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum er galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tær grannskoðanaratgerðir, sum hesir váðar krevja og fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru neyðug og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri at týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, ikki verða avdúkaðir, er hægri enn týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til síðis.

- Fáa innlit í innanhýsis eftirlitið, sum hevur týdning fyri grannskoðanina fyri at leggja tær grannskoðanaratgerðir til rættis, sum eru nøktandi til umstøðurnar, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til tann roknskaparhátt, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar og viðheftum upplýsingum, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Taka støðu til um tað er rímiligt, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum er fingin til vega, er týðandi óvissa í sambandi við atgerðir og viðurskiftir , sum kunnu viðføra týðandi óvissu um, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit vísa á hesi viðurskiftini í ársroknskapinum í niðurstøðu okkara ella, um hesar ávísingarnar ikki eru nóg mikið, tillaga okkara niðurstøðu. Niðurstøður okkara byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar í framtíðini ella onnur viðurskiftir kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Taka støðu til ta samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, eisini upplýsingarnar í notunum, og um ársroknskapurin vísir tey grundleggjandi handilsviðurskiftir og hendingar á ein slíkan hátt, at ein rættvísandi mynd fæst.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær grannskoðað verður og eisini um týðandi avdúkingar, herundir um týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

Vit veita eisini teimum, ið hava ábyrgd av leiðslu, eina váttan um, at vit liva upp til øll viðkomandi etisk krøv

viðvíkjandi óheftni. Vit samskifta um øll viðurskifti sum kunnu hugsast at ávirka okkara óheftni, og har tað er viðkomandi, hvørji trygdartiltøk eru sett í verk.

Tórshavn, tann 28. februar 2019

| | |
|---|---|
| **PricewaterhouseCoopers** | **Januar** |
| Statsautoriseret Revisionspartnerselskab | løggilt grannskoðanarvirki, P/F |
| | |
| Heidi Brander | Heini Thomsen |
| statsaut. revisor | statsaut. revisor |

**Nýttur roknskaparháttur**

**Alment**
Ársfrásøgnin hjá P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldsfelagsskapum.

Nýttur roknskaparháttur er óbroyttur í mun til ársfrásøgnina fyri 2017.

**Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini**
Inntøkur verða innroknaðar, so hvørt tær eru vunnar, herundir eisini virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðir allir teir kostnaðir, ið viðvíkja árinum, herundir eisini av- og møguligar niðurskrivingar.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini vilja geva fyritøkuni fíggjarligar fyrimunir, og at virðið kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr fyritøkuni, og at virðið kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur tiknar við til útveganarvirði. Síðani verða hesar virðisásettar, sum greitt frá niðanfyri undir teimum einstøku postunum.

Innrokningar og virðisásetingar taka hædd fyri tapi og tapsváðum, ið vóru væntað, tá ið roknskapurin varð lagdur fram til góðkenningar.

**Samtaksviðurskifti og nærstandandi partar**
Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreidd til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

**Roknskaparligar metingar**
Roknskaparliga virðið á ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum av, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum.

**Rakstrarroknskapurin**

**Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt**
Upphæddin fevnir um brutto tryggingarinntøkur, javnað fyri latin endurtryggingargjøld.

**Úrslit av íløguvirksemi**
Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. fevnir um ársins rentuinntøku av innlánum, virðisbrøvum og vinningsbýti av partabrøvum. Virðisjavningar fevna um ársins virðisjavning av virðisbrøvum.

Tann partur av fyrisitingarkostnaði felagsins, sum hevur beinleiðis tilknýti til íløguvirksemi, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi.

**Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt**
Goldnar veitingar í árinum, umframt broyting í avsetingum til endurgjøld frádrigið endurtryggjarans part, verða innroknaðar sum tryggingarveitingar. Upphæddin fevnir eisini um afturkeyp av tryggingargjøldum og afturberingar av tryggingargjøldum.

**Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi**
Tann parturin av rakstrarkostnaðinum, ið beinleiðis ella óbeinleiðis kann knýtast at fasthaldan av verandi tryggingum og/ella at nýtekningum, er vístur undir nýtekningarútreiðslum.

Fyrisitingarkostnaður fevnir um útreiðslur, sum eru nýttar í sambandi við umsiting av verandi tryggingum og av tíðargreinaðum útreiðslum, ið viðvíkja roknskaparárinum.

í 2018 bert um fyrisitingarkostnað. Fyrisitingarkostnaður fevnir um útreiðslur, sum eru nýttar í sambandi við fyrireiking til tryggingarvirksemi

**Flutt úrslit av íløguvirksemi**
Tann parturin av úrslitinum av íløguvirkseminum, sum viðvíkur eginognini verður innroknaður í henda postin. Tað eru ikki ávísar íløguognir knýttar at eginognini, og tí verður parturin hjá eginognini roknaður út sum ein lutfalsligur partur av samlaða úrslitinum.

**Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi**
Vísur tryggingartekniska úrslitið av felagsins sjúkra- og vanlukkutryggingarsáttmálum. Úrslitið er útgreinað í notu við niðanfyristandandi linjum:

**Tryggingargjøld fyri egna rokning** – uppkravd tryggingargjøld við frádrátti av møguligum endurtryggingargjaldi

**Skaðaendurgjøld fyri egna rokning** – fevnir um goldnar veitingar í árinum við frádráttur av møguligum endurgjaldð frá endurtryggjarum, og javningar í skaðaavsetingum viðvíkjandi sjúkra- og vanlukkutryggingarsáttmálum. Skatðaendurgjøld fyri egna rokning fevnir um kend og væntað skaðaendurgjøld í roknskaparárinum, og eisini møguligt úrslit av endurgjaldsavsetingum. Skaðatiltak viðvíkjandi sjúkra- og vanlukkutrygging er í fíggjarstøðuni víst í upphæddini endurgjaldsavsetingar.

**Skattur**
Skattur av ársúrslitinum er roknaður við støði í úrsliti áðrenn skatt, tillagað fyri ikki skattskyldugar inntøkur og útreiðslur. Útreiðsluførdi skatturin fevnir um aktuellan skatt av skattskylduga ársúrslitinum og javning av útsettum skatti

Avsetingin til útsettan skatt verður roknað við 18% av teimum tíðarbundnu avvikunum, sum stava frá, at inntøkur og útreiðslur ikki verða tiknar við í rakstrarroknskapinum og skattskyldugu inntøkuni í sama tíðarskeiði.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum.

**Fíggjarstøðan**

**Íløguognir**
Virðisbrøv verða innroknað í fíggjarstøðuna til keypsprís við frádrátti av keypskostnaði, og verða eftir fyrstu innrokning virðissett til dagsvirði. Handlað virðisbrøv verða tikin við/úr fíggjarstøðuni á avrokningardegnum. Dagsvirði á børsskrásettum virðisbrøvum verður gjørt upp við støði í børsskrásetta endakursinum við árslok.

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Hædd verður tikið fyri væntaðum tapum.

**Avsetingar til tryggingaravtalur**
Avsetingar til Unit Link-avtalur fevnir um goldin inngjøld, javnað við virðisjavningum og við frádrátti av útgjøldum og fyrisitingarkostnaði.
Avsetingar til tryggingarendurgjøld fevna um fráboðar, men ikki útgoldnar tryggingarveitingar.

**Skuld**
Skuld verður mátað til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

**Útsettur skattur**
Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum

Útsettur skattur verður innroknaður við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi á statusdegnum. Útsett skattaáogn, herundir skattavirðið av framfluttum skattligum hallum, verða innroknað til tað virði, ognin væntandi kann avhendast fyri.

**Aktuellur skattur**
Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

**Tíðaravmarkingar**
Fevnir um forútgoldin tryggingargjøld.

**Lyklatøl**
Hesi eru útroknað sambært ásetingunum í kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2018

| Nota | DKK 1.000 | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning** | | |
| 1 | Bruttotryggingarinntøkur | 13.256 | 11.728 |
| | Endurtryggingargjøld | -418 | -399 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **12.838** | **11.329** |
| | **Íløguvirksemi** | | |
| 2 | Rentuinntøkur og vinningsbýti | 270 | 596 |
| 3 | Virðisjavningar | -412 | -711 |
| | Rentuútreiðlsur | 89 | 47 |
| | Fyrisitingarkostnaður í sambandi við íløguvirksemi | -19 | -22 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **-251** | **-184** |
| | **Tryggingarveitingar** | | |
| 4 | Útgoldnar veitingar | 2.786 | 6.150 |
| 5 | Broytingar í endurgjaldsavsetingum | -336 | 170 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt** | **2.450** | **6.320** |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi** | | |
| | Nýtekningarkostnaður | 2.886 | 2.961 |
| 6 | Fyrisitingarkostnaður | 1.328 | 1.171 |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning** | **4.213** | **4.133** |
| | Flutt úrslit av íløguvirksemi | **251** | **184** |
| | **Tryggingartekniskt úrslit** | **6.174** | **876** |
| 7 | Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi | **905** | **525** |
| | Íløguúrslit av eginognini | **-251** | **-184** |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **6.828** | **1.217** |
| 8 | Skattur | 1.229 | 219 |
| | **Úrslit** | **5.599** | **998** |

# Fíggjarstøða 30. des. 2018

## Ogn

| Nota | DKK 1.000 | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir** | | |
| 9 | Íløguprógv | 37.193 | 31.670 |
| | Innlán í kreditfeløgum | 4.041 | 4.076 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir í alt** | **41.235** | **35.747** |
| | **Íløguognir í alt** | **41.235** | **35.747** |
| | **Íløguognir knýttar at Unit Link sáttmálum** | **1.090** | **540** |
| | **Áogn** | | |
| | Áogn hjá tryggingartakarum | 0 | 256 |
| | **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingarsáttmálar í alt** | **0** | **256** |
| | Áogn hjá tilknýttum fyritøkum | 0 | 0 |
| | **Áogn í alt** | **0** | **256** |
| | **Tíðaravmarkingar** | | |
| | Rentur til góðar | 198 | 214 |
| | **Tíðaravmarkingar í alt** | **198** | **214** |
| | **Ogn í alt** | **42.522** | **36.757** |

# Fíggjarstøða 30. des. 2018

## Skyldur

| Nota | DKK 1.000 | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| 10 | **Eginogn** | | |
| | Partapeningur | 20.000 | 20.000 |
| | Yvirkursur við partabrævaútgávu | 10.000 | 10.000 |
| | Tilmælt vinningsbýti | 5.000 | 0 |
| | Fluttur vinningur | 1.914 | 1.315 |
| | **Eginogn í alt** | **36.914** | **31.315** |
| 11 | **Ábyrgdarlán** | **2.000** | **2.000** |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur** | | |
| | Avsett til endurgjøld | 914 | 1.553 |
| | Avsetingar til Unit Link sáttmálar | 1.090 | 540 |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur** | **2.004** | **2.093** |
| | **Skuld** | | |
| | Skuld til tilknýttar fyritøkur | 374 | 816 |
| | Beinleiðis skattur | 1.229 | 219 |
| | Onnur skuld | 0 | 81 |
| | **Skult í alt** | **1.603** | **1.116** |
| | Tíðaravmarkingar | 0 | 233 |
| | **Tíðaravmarkingar í alt** | **0** | **233** |
| | **Skyldur í alt** | **42.522** | **36.757** |

# Eginognsuppgerð

| DKK 1,000 | Parta-peningur | Yvirkurs-grunnur | Tilmælt vinningsbýti | Flutt úrslit | Eginogn |
|---|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2017** | 20.000 | 10.000 | 0 | 318 | 30.318 |
| Rørslur á eginognini 2017 | | | | | 0 |
| Ársúrslit | | | 0 | 998 | 998 |
| **Eginogn 31. desember 2017** | **20.000** | **10.000** | **0** | **1.315** | **31.315** |
| | | | | | |
| **Eginogn 1. januar 2018** | 20.000 | 10.000 | | 1.315 | 31.315 |
| Rørslur á eginognini 2018 | | | | | 0 |
| Ársúrslit | | | 5.000 | 599 | 5.599 |
| **Eginogn 31. desember 2018** | **20.000** | **10.000** | **5.000** | **1.914** | **36.914** |

# Notur

| Nota | DKK 1.000 | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| 1 | **Tryggingarveitingar** | | |
| | Leypandi gjøld | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | | |
| | Tryggingar teknaðar í sambandi við starvssetan | | |
| | **Leypandi gjøld í alt** | **0** | **0** |
| | Eingangsgjøld | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | | |
| | Tryggingar teknaðar í sambandi við starvssetan | | |
| | **Eingangsgjøld í alt** | **0** | **0** |
| | **Inntøkur frá samlagstryggingum** | **13.256** | **11.728** |
| | **Bruttotryggingarinntøkur í alt** | **13.256** | **11.728** |
| | Harav gjøld úr Føroyum | **13.256** | **11.728** |
| | Tal av tryggjaðum | 6388 | 6127 |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 0 | 0 |
| | Tryggingar teknaðar í sambandi við starvssetan | 0 | 0 |
| | Samlagstryggingar | 6388 | 6127 |
| 2 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Rentur av virðisbrøvum og innlánum | 270 | 596 |
| | **Rentuinntøkur í alt** | **270** | **596** |
| 3 | **Virðisjavningar** | | |
| | Lánsbrøv | -412 | -711 |
| | **Virðisjavningar í alt** | **-412** | **-711** |
| 4 | **Útgoldnar veitingar** | | |
| | Eingangsútgjøld við deyða | 1.200 | 1.550 |
| | Restskuldartrygging | 1.586 | 4.600 |
| | **Útgoldnar veitingar í alt** | **2.786** | **6.150** |

# Notur

| Nota | DKK 1.000 | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| 5 | **Broyting í endurgjaldsavsetingum** | | |
| | Avsett til endurgjøld | -336 | 170 |
| | **Virðisjavningar í alt** | **-336** | **170** |
| 6 | **Fyrisitingarkostnaðir innihalda** | | |
| | **Løn og samsýning til nevnd og stjórn** | **0** | **36** |
| | Felagið hevur ikki fólk í starvi, uttan stjóra, sum fær samsýning í Trygd, og tí er ongin løn ella samsýning goldin út uttan til nevndalim. | | |
| | Samsýning til grannskoðarar | | |
| | Januar løggilt grannskoðaravirkið P/F og PriceWaterhouseCoopers | | |
| | Grannskoðan | 81 | 63 |
| | Grannskoðan undanfarin ár | 0 | 0 |
| | Aðrar tænastuveitingar | 20 | 19 |
| | **Útreiðslur til grannskoðarar í alt** | **101** | **81** |
| 7 | **Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutrygging** | | |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning** | | |
| | Tryggingargjøld | 1.190 | 1.438 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **1.190** | **1.438** |
| | **Skaðaendurgjøld** | | |
| | Útgoldnar veitingar | -200 | -590 |
| | Broyting í úgoldnum veitingum | 303 | -323 |
| | **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning í alt** | **103** | **-913** |
| | Rakstrarkostnaður av sjúkra og vanlukkutrygging | -389 | 0 |
| | **Úrslit av sjúkra- og vanlukkutrygging í alt** | **905** | **525** |

# Notur

| Nota | DKK 1.000 | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| 8 | **Skattur av ársúrsliti** | | |
| | Úrslit áðrenn skatt | **6.828** | **1.217** |
| | Skattur av skattskyldugari inntøku | -1.229 | -219 |
| | Útsettur skattur | 0 | 0 |
| | **Rakstrarførdur skattur** | **-1.229** | **-219** |
| | | | |
| | **Útsettur skattur** | | |
| | Framflutt hall | 0 | 0 |
| | **Útsettur skattur í alt** | **0** | **0** |
| | | | |
| | **Effektivt skattaprosent** | | |
| | Skattaprosent | 18,0 | 18,0 |
| | Inntøkur og útreiðslur, ið skattur ikki roknast av | 0,0 | 0,0 |
| | **Útgoldnar veitingar í alt** | **18,0** | **18,0** |
| | | | |
| 9 | **Útgreinan av íløgum** | | |
| | Íløguprógv í statslánsbrøvum | 0 | 0 |
| | Íløguprógv í realkreditlánsbrøvum | 37.193 | 31.670 |
| | **Íløguprógv í lánsbrøvum í alt** | **37.193** | **31.670** |
| | | | |
| | | **Avkast í % áðrenn skatt** | |
| | Íløguprógv í statslánsbrøvum | 0% | |
| | Íløguprógv í realkreditlánsbrøvum | -0,43% | |
| | **Íløguprógv í lánsbrøvum í alt** | **-0,43%** | |

# Notur

| Nota | DKK 1.000 | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| 10 | **Eginogn** | | |
| | **Partapeningur** | | |
| | Partapeningur við ársbyrjan | 20.000 | 20.000 |
| | **Partapeningur í alt** | **20.000** | **20.000** |
| | **Yvirkursgrunnur** | | |
| | Yvirkursgrunnur við ársbyrjan | 10.000 | 10.000 |
| | **Yvirkursgrunnur í alt** | **10.000** | **10.000** |
| | **Flutt úrslit** | | |
| | Flutt úrslit við ársbyrjan | 1.315 | 318 |
| | Tilmælt vinningsbýti | 5.000 | 0 |
| | Flutt frá ársúrslitinum | 599 | 998 |
| | **Flutt úrslit í alt** | **6.914** | **1.315** |
| | **Eginogn við árslok** | **36.914** | **31.315** |

**Partapeningur**

Samlaði partapeningurin hjá felagnum er eitt partabræv á 20.000 tkr, sum P/F BankNordik eigur.

P/F NordikLív Lívstryggingarfelag verður innroknað í samtaksroknskapin hjá P/F BankNordik.

| | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | **Grundarfæfeingið og fæfeingiskrav** | | |
| | Eginpeningur | 36.914 | 31.315 |
| | Tilmælt vinningsbýti | -5.000 | 0 |
| | Ábyrgdarlán | 2.000 | 2.000 |
| | Grundarfæfeingið | 33.914 | 33.315 |
| | Fæfeingiskrav | 27.629 | 26.057 |
| 11 | **Ábyrgdarlán** | **2.000** | **2.000** |

Ábyrgdarlánið er veitt av BankNordik við hesum treytum:
Lánið verður rentað við 4,6% og er galdandi til 30. juni 2027. Lánið kann ikki sigast upp av hvørki lántakara ella lángevara. Lánið er eftirstillað alla aðra skuld, sum ikki er eftirstillað skuld, men er stillað frammanfyri partepeningin.

Ábyrgdarlánið á 2.000 tkr. verður talt við í grundarfæfeingið.

# Notur

| Nota | DKK 1.000 | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| 12 | **Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur** | | |
| | Avseting við ársbyrjan | 539.820 | 0 |
| | Bruttotyggingarinntøkur | 619.607 | 540 |
| | Umsitingargjald | 8.753 | 0 |
| | Samansavnað virðisjavnan við ársenda | -60.931 | 0 |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur við ársenda** | **1.089.743** | **540** |

13 **Nærstandandi partar**

Niðanfyri nevnda felag hevur týðandi ávirkan á P/F NordikLív Lívstryggingarfelag

| **Navn og heimstaður** | **Grundarlag fyri ávirkan** |
|---|---|
| P/F BankNordik | Móðurfelag |
| Oknarvegur 5 | |
| Postsmoga 3048 | |
| FO-110 Tórshavn | |
| Føroyar | |

**Upplýsingar um nærstandandi partar**

P/F BankNordik eigur 100% av partabrøvunum í P/F NordikLív Lívstryggingarfelag og hevur tí avgerðandi ávirkan á felagið.

Aðrir nærstandandi partar hjá felagnum eru nevndar- og stjórnarlimir í felagnum og atknýtt felag, nevndar- og stjórnarlimir í hesum atknýtta felag, umframt nærstandandi persónar hjá áður allýstu persónum.

Í farna ári eru ikki gjørdir aðrir handlar við nevnd, stjórn, leiðarar ella aðrar nærstandandi partar enn tað, sum nevnt er niðanfyri.

Samsýning til nevnd og stjórn er víst í notu 6.

# Notur

**Nota DKK 1.000**

framh.

13 **Samhandil**

BankNordik selur tryggingar fyri NordikLív
Innanhýsis grannskoðanin hjá BankNordik er somuleiðis innanhýsis grannskoðan hjá NordikLív
BankNordik hevur fyrisitingina hjá NordikLív um hendi

BankNordik rágevur og samstarvar annars við NordikLív innan økini:
Marknaðarføring, Starvsfólkadeild, Íløgudeild, Búskapardeild og Menningardeild

NordikLív veitir tryggingar til starvsfólk hjá BankNordik

Samstarvið millum NordikLív og BankNordik er bygt á marknaðartryetir.

Umsitingargjøld til og frá atknýttum feløgum í samtakinum verða avroknað á útreiðslunøktandi støði.

Innlán hjá móðirfelagnum verður rentað eftir vanligum marknaðartreytum. Av samlaðu innlánunum við árslok 2018 vóru 4.041 tkr. innistandandi hjá móðirfelagnum (4.076 tkr. í 2017)

| **Týðandi samhandlar við atknýtt felag** | **2018** | **2017** |
|---|---|---|
| Tænastu og umsitingargjald | -165 | -125 |
| Nýtekningarkostnaður | -3.274 | -2.961 |
| Íløgurøkt | -19 | -22 |
| **Týðandi samhandlar við atknýtt felag í alt** | **-3.459** | **-3.108** |

14 **Viðkvæmisgreining av fíggjarognum**

| Hending: | Minsta ávirkan á grundarfæ-feingið í tkr. |
|---|---|
| Rentuhækking upp á 0,7 prosentstig | -207 |
| Rentulækking upp á 0,7 prosentstig | 207 |
| Lækking í deyðatali á 10,0 prosentstig | 279 |
| Hækkin í deyðatali á 10,0 prosentstig | -279 |